# Rannvá gjørdi bart

**BADMINTON** Rannvá Djurhuus Carlsson, sum vann sítt fyrsta føroyameistaraheitið í fremstu bandmintondeildini í vár sum 14 ára gomul, hevur um vikuskiftið gjørt enn eitt skarslop á síni badmintonleið

Uni Holm Johannesen

Hon vann leygardagin á tveimum teimum fremstu kvinnuligu leikarunum í Pólandi í hennara aldursbólki.

Tað hendi, tá hon, við U17 landsliðnum, tók lut í altjóða liðkapping í Pólandi, nevnd Olympic Hopes.

Rannvá vann fyrst í einmansleiki móti 16 ára gomlu Magdalenu Witek á fyrsta liðnum hjá Pólandi. Settúrslitini vóru 19-21, 21-12 og 21-10.

Seinni um dagin vann hon meira sannførandi móti Mariu Taraszkiewicz, sum er á talentliðnum hjá Póla ndi. Settúrslitini vóru 21-7 og 21-15.

Rannvá Djurhuus Carlsson er tikin út at taka lut í úrvalshópinum hjá ÍSF saman við nøkrum av okkara evnaríkastu ítróttarfólkum. Úrslitið í Pólandi er uttan iva við til at stimbra undir hugin og viljan at halda fram við miðvísa venjingararbeiðinum.

*uni@sosialurin.fo*

# Nýtt graslíki í Gundadali

**FÓTBÓLTUR** Graslíki á niðara fótbóltsvøllinum í Gundadali verður nú skift

Uni Holm Johannesen

Gamla graslíkið er longu tikið av, og nú verður skjótt farið undir at leggja nýggja graslíkið á.

Vøllurin var seinast skiftur í 2005. Heðin Mortensen, borgarstjóri í Tórshavnar kommunu, sigur, at tað vóru ymisk mistøk við gamla graslíkinum. Tað er partur av garantinum, at nýtt undirlag verður lagt á.

Nýggja graslíkið er sama slag sum á fótbóltsvøllinum á Argjum.

## Ítrótturin um vikuskiftið:

**Fríggjadagin, 12. november:**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| FLOGBÓLTUR | ÍF – Ternan | Fuglafjørður | Klokkan 19.30 | Kvinnur |

**Leygardagin, 13. november:**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| FLOGBÓLTUR | SÍ – TB | Sørvágur | Klokkan 13.00 | Kvinnur |
| FLOGBÓLTUR | Fleyr – Mjølnir | Tórshavn | Klokkan 14.30 | Kvinnur |
| FLOGBÓLTUR | KÍF – Dráttur | Kollafjørður | Klokkan 15.00 | Kvinnur |
| FLOGBÓLTUR | TB – ÍF | Tvøroyri | Klokkan 15.00 | Menn |
| FLOGBÓLTUR | Fleyr – SÍ | Tórshavn | Klokkan 16.30 | Menn |

**Sunnudagin, 14. november:**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| HONDBÓLTUR | VB – Kyndil | Vágur | Klokkan 15.00 | Kvinnur |
| HONDBÓLTUR | VÍF – StÍF | Vestmanna | Klokkan 15.00 | Menn |
| HONDBÓLTUR | Neistin – Team KL. | Tórshavn | Klokkan 16.00 | Menn |
| HONDBÓLTUR | KÍF – Kyndil | Kollafjørður | Klokkan 16.00 | Menn |
| HONDBÓLTUR | VÍF – StÍF | Vestmanna | Klokkan 18.00 | Kvinnur |



*Ósigraðu bláu greipuvinnararnir úr Neistanum, eru sum vera man, stórfavorittar móti botnproppinum úr Klaksvík*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Toppur móti botni

**HONDBÓLTUR** Team Klaksvík vitjar í høllini á Hálsi sunnudagin. Mótstøðuliðið er Neistin, sum er fremst í bestu mansdeildini

Uni Holm Johannesen

Team Klaksvík hevur havt fleiri stórar uppgávur í hesum kappingarárinum.

Klaksvíkingar hava framvegis ikki loyst nakra av teimum.

Nú verður størsta avbjóðingin av øllum.

Team Klaksvík vitjar hjá verandi greipuvinnarunum, sum framvegis eru ósigraðir í hesum kappingarárinum.

Aftaná drúgvan skaðar, eru bæði Jugoslav Djumic og Kristian Dulavík við aftur í hópinum hjá Neistanum. Tað gevur Jón Ludvík kapping um plássið sum linjuspælari.

### Kyndil rennur aftaná

KÍF og Kyndil spæla í Kollafirði.

Grønu havnarmenninir eru tvey stig aftan fyri kollfirðingar, sum eru nummar tvey. Tað plássið gevur atgongd til finaluplláss.

Um Kyndil tapir, missa teir sambandið fyribils við ovastu liðini. Um teir hinvegin vinna, liggja teir væl fyri í kappingini.

VÍF og StÍF spæla í Vestmanna.

*uni@sosialurin.fo*

# VB er undir trýsti

**HONDBÓLTUR** VB hevur kappast millum ovastu liðini seinastu árini. Nú eru vágskvinnur undir trýsti. Tær renna aftaná og noyðast at fáa fult móti Kyndli, um tær ikki skulu missa sambandið



*Savnsmynd*

Uni Holm Johannesen

VB hevur sjey stig í løtuni, sum er fimm færri enn Stjørnan, sum er fremst.

Um uppflytararnir úr Kyndil fáa fult í Vági sunnudagin, verður ein miðbólkur á stigatalvuni við VB og Kyndil. Vinnur VB, fer stigatalvan í tvíningar.

Tí eru vágskvinnur undir trýsti. Tær skulu syrgja fyri at fáa best møguligu fyrireikingarnar til dystin næsta vikuskiftið, tá VB vitjar hjá Stjørnuni í Klaksvík.

Niðastu liðini, VÍF og StÍF, spæla í Vestmanna sunnudagin. VÍF hevur tvey stig, og StÍF hevur eitt stig.

Tað hava bæði liðini stóran tørv á stigum fyri at vinna seg fram á stigatalvuni.

*uni@sosialurin.fo*